# Stór umhvørvisráðstevna

**Dagarnar 2. og 3. mai verður Orku- og umhvørvisráðstevna í Norðurlandahúsinum. Føroya Náttúruverndarfelag skipar fyri stevnuni. Millum røðarnar verður Svend Auken, fyrrverandi ráðharri í umhvørvismálum**

RÁÐSTEVNA
*Heri á Rógvi*

Dagarnar 2. og 3. mai verður Orku- og umhvørvisráðstevna í Norðurlandahúsinum. Tað er Føroya Náttúruverndarfelag, sum skipar fyri Ráðstevnuni. Ráðstevnan er fyri øll. Flestu luttakarararnir á stevnuni eru innbodnir, men fyrireikararnir vilja geva fólkið møguleikan at vera við á ráðstevnuni, og tískil hava teir skipað soleiðis fyri, at ein avmarkað mongd av fólki kunnu fáa ókeypis atgongumerki við dyrnar.

Aðaltátturin eru verandi og framtíðar orku- og umhvørvismál, ið m.a. verða lýst av professionellum fólkum umboðandi heimsins mest framkomu tøkni, gransking og annars lóggávu, politikk og umsitingar- og útinnandi partar v.m, skrivar felagið í tíðindaskrivi.



Millum fyrilestrarhaldararnar er eisini Svend Auken, sum er fyrrverandi formaður í Socialdemokratiet, og hann hevur eisini verið danskur ráðharri í orku- og umhvørvismálum.

Kári Thomsen, fyrireikari, sigur, at teir hava bjóðað honum við, tí hann hevur ógvuliga stóran kunnleika til orku- og umhvørvismál.


...EIN FERÐ INN Í FRAMTÍÐINA
í Norðurlandahúsinum og Útvarpshøllini 19.-20. apríl

- 19. apríl: »Business to Business dagur« neyðugt við tilmelding frammanundan. Kostnaður kr. 475,-
- 20. apríl: Almennur dagur. Atgongumerki verða keypt við dyrnar. Kostnaður kr. 80,-

KT 2002

KT 2002 · P.O.Box 26 · FO-600 Saltangará · tel. 44 95 91 · fax. 44 95 92 · e-mail: info@kt.fo

REPRO-Z 319540

FØROYA TELE formula.fo FØROYA BANKI ATLANTIC AIRWAYS


## Skrá til fyrilestrarøð

**Hósdagur 2 mai.**

Kl. 09.15 Bjóða verður vælkomin við tónleikaframførslu.
09.25 ***Ráðstevnan verður sett***, Eyðun Eltør, landsstýrism. í umhvørvismálum.
09.30 ***Fólk og náttúra í orkusamfelagnum***. Føroya Náttúruverndarfelag, Kári Thomsen, formaður.
09.50 ***Verandi orkunýtsla og útbyggingarætlanir*** við serligum atliti til ravmagn. SEV. Klæmint Weihe, stjóri.
10.20 Stuttur steðgur.
10.30 ***Veðurlagsbroytingar***, Knud Simonsen, havfrøðingur
10.55 ***Vindmátingar***, Data Quality, Signar P. Heinesen, verkfrøðingur.
11.15 ***Konsept fyri vindmyllufeløg, projektmetingar og útinnan***. Tech-Wise, Bent Jørgensen, sølustjóri, Danmark.
11.45 Døgurðasteðgur.
13.00 ***Vindmylluídnaðurin í dag og í framtíðini á norðulendskum/altjóða støði***. Um vindmyllur, konstruktión og framleiðslu, flutning og uppsetan o.a. Um mylluveingir, design, konstruktión og framleiðsla o.a. Vestas Wind Systems A/S, Anders Amby, sølustjóri. Danmark.
14.20 Steðgur
14.50 ***Íslendskur orkupolitikkur.*** Hjalmar Arnason, Altingslimur og formaður fyri orku og handli.
15.20 ***Ísland í brennukyknuøldini.*** Frá termiskari orku til brintorku. Icelandic New Energy, Jón Bjørn Skúlason, stjóri
16.05 ***Menningin innan brennikyknutøknina.*** Ballard Power Systems GmbH, Dr. Werner Tillmetz, sølu- og menningarstjóri.

## Skrá til fyrilestrarøð

**Fríggjadagur 3. mai.**

Kl. 09.15 Bjóða verður vælkomin við tónleikaframførðslu.
09.25 ***Umhvørvi, ein vistskipan í javnvág.*** Náttúruvísindadeildin. Eyðfinn Magnussen, lívfrøðingur.
09.55 ***Lokal Agenda 21.*** Finnbogi Joensen, umsjónarmaður, Vestmanna
10.20 Stuttur steðgur.
10.30 ***Verandi ruskviðgerð og útbyggingarætlanir.*** IRF. Poul A. Joensen, stjóri.
10.55 ***Frá ruski til tø og orku.*** Sóptøð/biogasskipanir, tø og metan-orka. Nordvestjysk Folkecenter for Vedvarende Energi, v/ Preben Maegaard, stjóri og næstformaður í EUROSOLAR, Europeiska felagið fyri varandi orku.
11.30 ***Umhvørvis- og náttúruverndarmál. Umsiting og lóggáva.*** Heilsufrøðiliga Starvsstovan. Jákul Pauli Joensen, deildarleiðari.
11.55 Døgurðasteðgur.
13.00 ***Alduorku- verkætlan í Suðuroy.*** Jan Poulsen og Tórfinn Simonsen, verkfrøðingar.
13.30 ***Sólkyknur.*** Dansk Solenergi. (Siemens) Danmark. v/ Ken H. Jensen, verkfrøðingur.
14.00 ***Sólpanelir.*** Batec. Danmark. Emanuel Brinder, stjóri
14.20 Steðgur.
15.00 ***Norðurlendskt umhvørvisarbeiði. Mál, arbeiðsætlanir, orkusektorurin o.a.*** Nordisk Ministerråd, embætismannabólkurin v/ Håvard Turesen frá Norges Miljøverndepartement, formaður fyri Nordisk Klimagruppe.
15.30 ***Orku- og umhvørvispolitikkur í Danmark.*** Svend Auken, fyrrv. ráðharri í orku- og umhvørvismálum.
16.00 ***Skrá fyri framtíðar orku- og umhvørvispolitikki.*** Katrin Dahl Jakobsen, løgtingslimur.



# Tyrlupallurin kann ikki brúkast

**Til venjingina YTRA 2001 kundi tyrlupallurin við Landssjúkrahúsið ikki nýtast. Ein nýggj til og frá koyring er neyðug**

BJARGING
*Heri á Rógvi*

Ein av niðurstøðunum í eftirmetingini av venjingini YTRA 2001 var, at tyrlupallurin við Landssjúkrahúsið ikki kundi nýtast til venjingina. Tað var sjón fyri søgn, tí tyrlurnar vórðu noyddar at lenda á Eystaruvág ístaðin fyri á tyrlupallinum við Landssjúkrahúsið. Heri Andreassen, politiassistent, sum var við til at fyrireika venjingina og eisini hevur verið við til at skriva eftirmetingina saman við Eivin H. Jacobsen og William Askham.

### Til og frá

Heri Andreassen sigur, at tað í einari vanlukkustøðu ikki ber til at flúgva fólk til tyrlupallin við Landssjúkrahúsið, tí sjúkrabilarnir hava so ringt við at koma til og frá staðnum.

– Sjúkrabilarnir noyðast at bakka niðanaftur. Teir kunnu ikki venda, og bert ein bilur fær koyrt eftir vegnum í senn, sigur Heri Andreassen.

Hetta ger, at sjúkrabilar mugu standa og bíða eftir hvørjum øðrum, og hetta ber ikki til í einari bjarging í sambandi við størri vanlukkur.

– Tyrlupallurin riggar væl, um tað altso bert er ein sjúklingur, sum skal flytast til ella frá, men tá tað kemur til størri bjargingar, so ber ikki til at nýta pallin, sigur Heri Andreassen.

Hann sigur, at teir ikki ætlaðu at royna sum fremsta endamál, hvussu tyrluflúgvingin og møguleikarnir við hesari vóru, men heldur varð hetta ein bjargingarroynd fyri flogvøllin. Hann sigur, at teir mugu so taka hetta omaná hitt, sum kom burturúr.

At nýta Eystaruvág var kortini ikki heilt av leið, tí hetta lá rímuliga tætt við Landssjúkrahúsið, har sjúklingarnir skuldu. Heri Andreassen sigur, at teir hava gott samstarv við Tórshavnar Havn, sum gevur teimum góðar møguleikar at rudda økið, tá tað er neyðugt, men hetta er treytað av, at umstøðurnar á bryggjuni eru sum nú.

Ein fyrimunur við at lenda á Eystarubryggju ístaðinfyri á Boðanesi, har tyrlur vanliga lenda í Havn, er, at bert fáir vegir skulu sperrast av, og hetta klárar løgreglan rímiliga lætt at taka sær av.

– Tað er ein fyrimunur fyri okkum at vera har ístaðinfyri á Boðanesi, har vit skulu koyra gjøgnum nógva ferðslu, men sjálvandi hevði tað verið best at verið so tætt at sjúkrahúsinum sum gjørligt, sigur Heri Andreassen.

### Hava upplivað óhapp

Heri Andreassen sigur, at teir hava upplivað, at ein sjúkrabilur er farin av vegnum til tyrlupallin, og hetta er ótrúliga óheppið.

– Tað ber til at nýta tyrlupallin, eisini hjá rímiliga stórum tyrlum, men hetta er ikki optimalt. Neyðugt er við einari til og frá skipan, ið kann nýtast í størri bjargingum eisini, sigur Heri Andreassen.

Hann sigur, at tað er ein politisk avgerð um, hvørt tað er rætt at gera nakað við tyrlupallin ella ikki.

YTRA 2001 er ein bjargingarvenjing, ið varð hildin 2. november 2001. Venjingin varð hildin fyri at royna tilbúgvingina í sambandi við Vága Floghavn, og tað var talan um ein stóra venjing, har nógv fólk luttóku. Tilgjørda vanlukkan var, at ein flúgvari var farin av breytini í Vágum og eldur var komin í. Hópin av fólki vóru skadd, og eisini var okkurt deyðsfallið.



*– Tað ber til at nýta tyrlupallin, eisini hjá rímiliga stórum tyrlum, men hetta er ikki optimalt. Neyðugt er við einari til og frá skipan, ið kann nýtast í størri bjargingum eisini, sigur Heri Andreassen.*

# Eivør góð ummæli í Íslandi

**Eivør Pálsdóttir, sum fyri eini tíð síðani fór yvir til Íslands at hvíla seg, fær góð ummæli í íslendskum bløðum. Hon verður skírd "...skærasta tónlistarstjarna Færeyinga..."**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*



*Eivør Pálsdóttir fær góð ummæli í íslendskum bløðum.*

Tað er ikki bara Týr, sum fær góð ummæli yviri í Íslandi. Eivør Pálsdóttir, sum seinastu tríggjar mánaðarnar hevur búleikast í Reykjavík, fær stak góð ummæli frá íslendskum bløðum, sum nú hava latið eyguni upp fyri føroyska songfuglinum. Okkurt av bløðunum vil vera við, at hon kundi væl klárað seg á útlendska tónleikamarknaðinum við rødd síni.

Íslendska Morgunblaðið heldur, sum so mong onnur, at Eivør viðhvørt minnir ikki sørt um kendu íslendsku songkvinnuna, Björk. Men sum allar hinar ferðirnar avnoktar Eivør, at hon vil ikki líkjast Björk.

– Eg lurti sjálv ikki nógv eftir Bjørk, sigur Eivør við Morgunblaðið. Hon sigur, at Clickhaze hellir meira til jazz og "þljóðlegar hefðir". Eisini er hon av teirri áskoðan, at øll eiga at syngja á sínum móðurmáli.

## Sjúkrasystraskúlin tekur ongan inn í heyst

Av tí, at í løtuni verður arbeitt við at gera nýggja og dagførda lóggávu fyri sjúkrasystraútbúgvingina í Føroyum, so verður ikki klárt at taka nýggjar næmingar inn á skúlan fyrr enn í jan./feb. 2003. Tí verður tað mett óheppið at taka inn lesandi eftir eini útbúgvingarskipan, sum væntandi verður broytt fáar mánaðar seinni.

Umsóknarfreistirnar í sambandi við upptøku til sjúkrasystraútbúgvingina verða kunngjørdar seinni.

***– ib***


Fleiri kvinnur á Ting

www.javnratt.fo

Lesið hvat

Helena D. á Neystabø
Heri Kragesteen
Jógvan Mørkøre

halda